Ongland tveitti alt burtur

Beckham hevði møguleikan at binda fyri, men ístaðin gjørdust tað Frakland og Zidane, sum við tveimum málum í yvirtíðini koppaðu øllum á høvdið. Ongland hevði annars alla tíðina líkst einum vinnara, men teir stóðu so eftir við ongum



Liðfelagarnir báðir, Beckham og Zidane, mundu ivaleyst fáa hvør sítt slag av umrøðu í mánadagsbløðunum í Onglandi og Fraklandi
Mynd: Reuters

BÓLKUR B
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Einki er at ivast í, at tær báðar størstu stjørnurnar á enska miðvøllinum mugu taka sín part av ábyrgdini á seg fyri enska tapið fyri Fraklandi.

David Beckham hevði í seinna hálvleiki av dystinum risa møguleika, tá hann við brotssparki skuldi senda framvið fyrrverandi liðfelaganum, Barthez, men franski málverjin bjargaði og helt við hesum Fraklandi inni í dystinum.

Og við eini illa umhugsaðari afturlegging var Steven Gerrard beinleiðis orsøk til franska sigursmálið, sum altso kom í 93. minutti.

Ótrúlig vend

Undan hesum hevði talan annars verið um ein dyst, sum gjørdist heilt so javnur, sum flestu serfrøðingarnir høvdu ímyndað sær. Helst høvdu bæði liðini í kvittanini, at í fyrsta dystinum mást tú í øllum førum ikki tapa, tí tað var langt millum veruligu møguleikarnar í dystinum, har báðir partar løgdu nógv fyri í verjupartinum.

Tað eydnaðist tó Onglandi at koma á odda seint í fyrra hálvleiki, tá Frank Lampard stútaði frísparkskinnlegg frá David Beckham í kassan.

Og hetta tóktist leingi at skula halda sær. Í seinna hálvleiki fekk Ongland so møguleikan, tá Silvestre feldi Wayne Rooyne í brotsteiginum, men tá hetta ikki gav úrslit, so livdi Frakland framvegis.

Seiastu minuttirnar fekk Frakland eisini av álvara lagt trýst á ensku verjuna, men tað tóktist nyttuleyst, fram til Heskey framdi eitt heldur óneyðugt fríspark á brotsteigarmarkinum. Zidane varð settur at skjóta, og so prógvaði hann, hvat tað er, sum ger stóru leikararnar so serligar. Nevnliga eginleikin at sláa til, júst tá tørvurin er størstur.

Javnleikur vildi framvegis verið eitt fint úrslit hjá Onglandi, og ivaleyst høvdu bæði liðini sligið seg til tols við hesum, tá Gerrard so framdi sín brølara. Uttan at vera trýstur, skuldi hann senda aftur til David James í málinum, men hann hevði ikki varnast tann lúrandi Henry, og tá hesin kom ímillum, hevði David James neyvan annað væl enn at taka beinini undan kvika framherjanum. Ein brotsgerð, sum væl kundi givið reytt kort.

Og so kundi Zidane eiga seinasta sparkið í dystinum. Hetta sendi hann trygt í kassan, og so verður talan um mótbrekku hjá Onglandi, sum í øllum førum má rokna við at skula hava fýra stig – og helst seks – burtur úr dystunum móti Sveis og Kroatia.

Málleyst

Hesi bæði leiktu eisini sunnudagin, og tá gjørdist talan um málleysan javnleik. Dysturin var kanska av teimum heldur keðiligaru, har Kroatia royndi at skapa nakrar møguleikar, men har Sveis alla tíðina vardi væl. Og samanumtikið, so kunnu báðir partar eisini brúka úrslitið til nakað.

Tað týdnignarmesta er í øllum førum ikki at tapa fyrsta dystin, tá bara tríggir dystir gera av, hvørji lið skulu víðari. Nakað sum onglendingar helst eisini hugsa um í dag, meðan teir sleikja nívandi sárini eftir dystin móti Fraklandi.

Úrslit

Sveis-Kroatia 0-0

Frakland-Ongland 2-1 (0-1)
0-1: Frank Lampard
1-1: Zinedine Zidane
2-1: Zinedine Zidane

Dystirnir týsdagin

Kl.	Dystur
17.00	Kekkia-Letland
19.45	Týskland-Holland

EM-endaspælið í fótbólti

Bólkur A

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Grikkaland	1	1	-	0	-	0	2	1	1	3
2 Spania	1	1	-	0	-	0	1	0	1	3
3 Portugal	1	0	-	0	-	1	1	2	-1	0
4 Russland	1	0	-	0	-	1	0	1	-1	0

Bólkur B

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Frakland	1	1	-	0	-	0	2	1	1	3
2 Sveis	1	0	-	1	-	0	0	0	0	1
3 Kroatia	1	0	-	1	-	0	0	0	0	1
4 Ongland	1	0	-	0	-	1	1	2	-1	0

Bólkur C

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Danmark	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
2 Italia	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
3 Svoríki	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
4 Bulgaria	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0

Bólkur D

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Týskland	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
2 Holland	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
3 Kekkia	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
4 Letland	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0

Kroystir vertir

Portugal gjørdist fyrstu vertirnir, sum taptu setunardystin í EM, tá Grikkaland púrasta óvæntað tók fult

BÓLKUR A
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað liggur eitt risa trýst á Portugal, eftir at teir taptu setunardystin í EM-kappingini fyri Grikkalandi. Somikið stórt er trýstið, at skal landið vinna seg víðari úr bólkaspælinum, fer tað eftir øllum at døma at krevja ein sigur á grannunum úr Spania í seinasta dystinum, og hetta hevur Portugal bert megnað fýra ferðir í teimum higartil 41 uppgerðunum, sum londini ígjøgnum tíðirnar hava leikt móti hvørjum øðrum.

Uppiborin sigur

Og tað kann alt fyri eitt staðfestast, at talan var um uppibornan sigur til Grikkaland. Frá fyrsta bríksli sýndi teir sera direkta spæl, har teir alt fyri eitt royndu at flyta bóltin, har vandastøðurnar kundu skapast, meðan Portugal í vanligum stíli royndi at koyra bóltin kring vøllni, í vón um at finna hol í væl skipaða verjupartinum hjá mótstøðuni.

Og longu eftir góðum seks minuttum gav hetta at bíta hjá grikkum. Sløsut spanskt spæl á miðvøllinum gav Karagounis møguleikan, og tá eingin vildi koma ímóti honum, dróg hann nakrar ferðir, áðrenn hann langaði eitt flatt skot inn um nærmasta stólpan.

Restina av hálvleikinum líktist Portugal als ikki einum liði, sum ætlar sær at vinna EM, og um nakað, so kundu gestirnir kanska økt um munin, men hetta mátti so bíða.

Og í seinna hálvleiki fingu teir so eisini somu dreymabyrjan, sum í fyrra. Felipe Scolari hevði í steðginum sent Ronaldo og Deco á vøllin fyri Simao og Rui Costa, men eftir bara sjey minuttum gjørdist Ronaldo syndari, tá hann feldi mótstøðumann í brotsteiginum. Brotssparkið sendi Basinas trygt í kassan, og so var alt mótbrekka hjá Portugal.

Tað var tó sjáldan líkt til, at teir av álvara skuldu hótta. Nakrar ferðir vóru teir nær við, men tað var ikki fyrr enn í yvirtíðini, at Ronaldo fekk minkað um munin við stútara, og tá var ov seint.

Valeron varð hetjan

Gekst illa hjá Portugal, so mundu grannarnir úr Spania vera betri nøgdir um sítt avrik, hóast tað leingi stóð nógv á í dystinum móti Russlandi.

Spania átti tað mesta av spælinum, men leingi var líkt til, at russar skuldu megna at byrgja fyri trýstinum. Í royndunum at økja um trýstið, sendi spanski venjarin við hálvum tíma eftir Valeron á vøllin, og hann skuldi so ikki nýta nógv tíð, áðrenn hann hevði staðfest sítt virði.

Við fyrsta sparki sínum í dystinum, sendi hann sigursmálið í kassan, soleiðis at Spania nú stendur við góðum kortum á hondunum, undan teimum báðum seinastu dystunum í bólkaspælinum.

Mest áhugaverdur av hesum tykist nú vera tann hjá Spania móti Grikkalandi. Grikkar megnaðu at vinna sín undankappingarbólk framman fyri júst Spania, og við einum sigri her kunnu teir mest sum tryggja sær sína víðari luttøku í bólkinum.Boðini úr sponsku leguni eru tó, at tey vilja hava hevnd fyri tapið á heimavølli seinast.

Og so er tað altso eisini seinasti dysturin millum Spania og Portugal. Vertirnir kunnu í øllum førum rokna við, at hesin dysturin skal vinnast, um teir skulu gera sær vónir um at koma víðari, og støðan kann eisini væl verða tann, at tað bara verður vinnarin av iberisku uppgerðini, sum fær rætt til at halda fram í kappingini.

Úrslit

Portugal-Grikkaland 1-2 (0-1)
0-1: Georgios Karagounis
0-2: Angelis Basinas, br.
1-2: Christiano Ronaldo

Spania-Russland 1-0 (0-0)
1-0: Juan Carlos Valeron

Hjalgrím Elttør byrjaði millum teir fyrstu ellivu hesaferð, og hann takkaði fyri álitið við at skjóta tvey av málunum í 3-1 sigrinum. Tríðja Fremad-málið skeyt Andrew av Fløtum

Hjalgrím takkaði fyri álitið

Føroyingarnir áttu øll trý málini, tá ið Fremad Amager á heimavølli legði sjógv millum seg og niðurflytingina

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Tað er gott lag í føroysku leguni í Fremad Amager. Undan síðsta umfarinum í hesum kappingarárinum, sum verður spælt næsta vikuskifti, hevur felagið hjá Jann Inga Petersen, Hjalgrími Elttør og Andrew av Fløtum væl og virðiliga trygglað sær enn eitt kappingarár í næstbestu deildini, sum teir fluttu upp í fyri einum ári síðani.

Og við føroysku eygum er tað hugaligt at staðfesta, at tá ið Fremad Amager sunnudagin á heimavølli vann 3-1 á Nykøbing Falster Alliancen, vóru allir triggir føroyingarnir á vøllinum allar 90 minuttirnar, og teir skoraðu øll trý Fremad málini. Andrew av Fløtum, sum var annar av álopsmonnunum, javnaði til 1-1, tá ið 2. hálvleikur var eitt korter gamalur. Málið fekk hann eftir innlegg úr vinstru og tríggjar ferðir aftur og fram. Síðsta korterið skoraði Hjalgrím Elttør tvær ferðir. Hetta var fyrsta ferðin, at hann skoraði á besta liðnum hjá Fremad Amager.

- Tað hevur gingið eitt sindur upp og niður, og tað hevur ikki altíð verið so hugaligt. Viðhvørt havi eg verið á liðnum, viðhvørt havi eg verið á beinkinum, og eitt skifti var eg als ikki í 1. liðs hópinum. Men nú hevur tað gingið rætta vegin. Venjarin hevur víst mær álit, eg havi verið millum teir fyrstu ellivu tær seinastu 5-6 ferðirnar, og so var tað sjálvandi hugaligt at skjóta mál aftur, sigur Hjalgrím Elttør úr Keypmannahavn.

Føroysku spælararnir hava spælt nógv á U 21 liðnum hjá Fremad Amager. Tað skulu teir eisini í dag, tá ið teir skulu spæla finalu ímóti Greve. Tann dysturin verður spældur í Greve.

Sunnudagin var Jann Ingi Petersen sentralur á miðvøllinum, meðan Hjalgrím Elttør var uttastur í høgra borði á miðvøllinum.

– Ein hjá mótstøðuliðnum fekk seinna gula kortið, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir. Eftir tað høvdu vit tak á tí. Í 77. minutti fekk eg fyrra málið. Tað kom eftir uppspæl í vinstru. Spælarin kom í brotsteigin og legði flatt innfyri. Eg kom inn frá høgru og setti innaru síðuna á, og sjálvandi var tað hugaligt at síggja bóltin fara upp í nettakið. Í 87. minutti gjørdist tað 3-1. Aftur ta ferðina varð lagt innfyri úr vinstr. Sendingin var í luftini. Eg rann skrátt inneftir og tamdi bóltinum framvið mótstøðumanninum, áðrenn eg sendi hann í málið, greiðir Hjalgrím Elttør frá, tá ið vit fregnast um sigurin og fyrstu málini, sum hann hevur skorað á besta liðnum hjá Fremad Amager.

– Málið hjá felagnum var at varðveita plássið í deildini. Tað hevur eydnast, og nú tað er eitt umfar eftir eru góðir møguleikar fyri, at vit fara at enda á tíggjunda plássinum, sigur Hjalgrím Elttør. Fremad Amager fer í summarfrí, tá ið dystirnir næsta vikuskifti eru spældir. Farið verður undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið 6. juli, og tað er greitt, at eingir av føroysku spælarunum fara at spæla við føroyskum liðum undan summarsteðginum. Tað hevur felagið hjá teimum sagt neit til.

Horsens dumpaði

Sunnudagin varð tað greitt, at Silkeborg og Randers næsta kappingarár skulu spæla í superliguni, har jysku felaginu skulu loysa høvuðsstaðarfelaginu AB og Frem av. Silkeborg vann 3-0 í Haderslev ímóti Sønderjyske, og Randers vann 4-2 í Brønshøj.

At tað longu sunnudagin varð greitt, at Randers verður seinni uppflytarin, komst av, at Johan Byrial Hansen og Horsens rudduliga dumpaðu seg sjálvar. Teir høvdu vitjan av langt síðani niðurfluttu B1913, sum vann 4-2!

Vejle tapti 1-0 í Keypmannahavn ímóti B93, sum harvið bjargaði sær. Tað eru góðir møguleikar fyri, at Vejle eisini fær eitt ár afturat í 1. deild. Umframt B1913 er FC Aarhus flutt niður, og Brønshøj tapið ímóti Randers ber við sær, at Brønshøj eftir øllum at døma eisini fer at flyta niður.

K'ge vann 5-1 á heimavølli ímóti Fredericia, og Skjold vann 2-1 á útivølli ímóti Ølstykke.

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Silkeborg	29	21	-	4	-	4	68	22	46	67
2 Randers FC	29	20	-	3	-	6	82	41	41	63
3 AC Horsens	29	18	-	5	-	6	49	26	23	59
4 Køge	29	17	-	7	-	5	59	37	22	58
5 Sønderjyske E	29	15	-	6	-	8	69	47	22	51
6 Skjold	29	15	-	4	-	10	58	47	11	49
7 Ølstykke	29	13	-	3	-	13	58	52	6	42
8 Nykøbing	29	12	-	4	-	13	43	49	-6	40
9 FC Nordjylland	29	10	-	9	-	10	34	41	-7	39
10 Fremad Amager	29	9	-	7	-	13	14	50	-36	34
11 Fredericia	29	8	-	9	-	12	39	46	-7	33
12 B 93	29	7	-	7	-	15	42	47	-5	28
13 Vejle	29	7	-	6	-	16	41	58	-17	27
14 Brønshøj	29	6	-	6	-	17	41	74	-33	24
15 FC Aarhus	29	5	-	5	-	19	28	69	-41	20
16 B 1913	29	3	-	7	-	19	26	72	-46	16

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Danska 2. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 HIK	29	17	-	7	-	5	65	41	24	58
2 Dalum	29	16	-	5	-	8	66	42	24	53
3 Næstved	29	14	-	8	-	7	58	33	25	50
4 Holbæk	29	14	-	8	-	7	61	41	20	50
5 Kolding FC	29	14	-	7	-	8	52	41	11	49
6 B1909	29	13	-	5	-	11	55	46	9	44
7 Slagelse	29	11	-	7	-	11	52	44	8	40
8 Hjørring	29	12	-	3	-	14	46	72	-26	39
9 Brabrand	29	10	-	8	-	11	49	45	4	38
10 Glostrup	29	11	-	4	-	14	52	56	-4	37
11 Lyngby	29	9	-	9	-	11	49	60	-11	36
12 Kalundborg	29	8	-	9	-	12	55	62	-7	33
13 Jetsmark	29	8	-	9	-	12	37	59	-22	33
14 Holstebro	29	8	-	6	-	15	46	60	-14	30
15 Skive	29	8	-	4	-	17	48	59	-11	28
16 Hvidovre	29	5	-	9	-	15	30	60	-30	24

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Fylkir	5	3	-	2	-	0	7	2	5	11
2 Keflavík	5	3	-	1	-	1	7	5	2	10
3 ÍA	5	2	-	2	-	1	5	3	2	8
4 FH	5	2	-	2	-	1	5	4	1	8
5 KR	5	2	-	1	-	2	6	7	-1	7
6 ÍBV	5	1	-	3	-	1	6	6	0	6
7 Grindavík	5	1	-	3	-	1	5	6	-1	6
8 Fram	5	1	-	2	-	2	7	7	0	5
9 KA	5	1	-	1	-	3	4	6	-2	4
10 Víkingur R	5	0	-	1	-	4	2	8	-6	1

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)